**Skúlastýrisfundur**

Dato: 05.05.2015

Tíð: 17:15–19:00

Til staðar: Jórun Simonsen, Andrea á Rípuni, Tummas Marni Joensen, Turið Á Tórgarði og Høgni Warberg

Heri Müller og Elspa Petersen góvu avboð til fundin.

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenna seinastu fundarfrágreiðing
2. Kunning frá aðalfundi Heim og skúli
3. Kunning frá skúlaleiðara
4. Fyrilestrahaldari til felagsforeldrafundin í heyst?
5. Hevur skúlastýrið nakra uppgávu til hugnadagin 24. juni?
6. Ymiskt

Att 1: Fundarfrásøgnin varð góðkend
Att 2: Jórun hevði verið til aðalfund hjá felagnum Heim og skúli. Jórun greiddi frá, at á aðalfundinum var tosað um at førleikamenna skúlastýrini, soleiðis at øll skúlastýrini gerast meira eins m.a. við nøkrum føstum mannagongdum. Á aðalfundinum varð eisini tosað um at dagføra heimasíðu hjá felagnum. Tað kom eisini fram á fundinum, at KT vørðar í skúlunum høvdu meir og meir at gera, men at tímar og pengar ikki fylgja við. Her kom Andrea við viðmerking um, at tað manglar útbúgving til KT-vørðar, og at mann hevur tosað um at seta í verk útbúgving til KT vørðar. Vit komu eisini inn á spurningin um, í hvønn mun skúlastýrið skal fáa innlit í úrslitini av landsroyndunum. Andrea segði, at best er um mann so fær innlit í úrslit, ið fevna yvir nøkur ár, soleiðis at mann betur kann samanbera og síggja hvør tendensurin er. Vit tosaðu eisini um námsætlanir og ársætlanir, og um skúlastýrið skal fáa innlit í ársætlanirnar. Tað kom á fundinum fram, at yvirskipaðu námsætlanirnar fyri alt landið

eru at finna á heimasíðuni www.namsaetlanir.net. Har stendur m.a. hvat hvør árgangur skal læra í hvørjari einstakari lærugrein. Ársætlanirnar hjá lærararunum í øllum lærugreinunum skulu gerast við støði í yvirskipaðu námsætlanunum. Andrea viðmerkti í hesum sambandi, at yvirskipaðu námsætlanirnar eru fullkomnasta ímyndin av ynskiligu úrtøku næminganna, og at einstøku ársætlanirnar í hvørjum einstøkum skúla mugu tillagast til næmingarnar í skúlanum. Á aðalfundinum hevði eisini verið kjakast um limagjald til felagið, og skúlar í Tórshavn noktaðu at gjalda. Viðvíkjandi royndarverkætlanum ið eru framdar í ymsum skúlum, var nevnt, at har manglaði eftirmetingar av verkætlanunum, og at hesar eftirmetingar eiga at verða lagdar út á neti, soleiðis at aðrir skúlar kunnu fáa innlit og harvið fáa íblástur. Á fundinum kom eisini fram, at óró var í ymsum skúlum, har foreldur vóru ónøgd við lærarar og leiðslur í skúlunum. Harumframt var á fundinum gjørt vart við, at Fólkaskúlaráðið ikki hevði verið virkið í eina tíð, og at bíða verður eftir MMR, ið manglar at velja umboð í ráðið.

Att 3: Høgni kunnaði um, at væntandi verða 50 næmingar í Kvívíkar skúla komandi skúlaár, og tí verður í hvussu so er tørvur á líka nógvum lærarum sum í inniverandi skúlaári. Tosað var um, at tað er óvirðiligt, at lærarar í tíðaravmarkaðum starvi, skulu søkja og fara til setanarsamrøður fleiri ár á rað. Høgni fer at seta MMR fyrispurning um hetta.
Høgni kunnaði um, at hann hevði sett seg í samband við Jógvan Jensen viðvíkjandi at fáa til vega ein hjartastartari til skúlan, umframt skeið í lívbjargandi fyrstuhjálp við nýtslu av hjartastartara. Skúlastýrið viðgjørdi í hesum sambandi eitt tilboð frá Jógvan Jensen, ið m.a. umfataði keyp av hjartastartara og skeið í fyrstuhjálp fyri upp til 15 persónar á 3 tímar. Tummas Marni nevndi, at 3 tímar er ikki nógv, og at hann vitsti um onkran annan, ið møguliga kundi geva okkum eitt betri tilboð. Avgjørt varð, at Tummas Marni skuldi kanna møguleikan fyri at innheinta eitt annað tilboð, og so skuldi hann senda okkum boð aftur via teldupost

Att 4: Hvør í sínum lagi høvdu vit til henda fund hugsað um møgulig nøvn og evni til fyrilestur til felagsforeldrafundin í heyst, ið væntandi verður 23. september. Høgni hevði eisini spurt lærararnar, og frá Súsannu var komið uppskot um ein fyrilestur við evninum ”samstarv og samskifti millum skúla og heim, og hvussu hetta kann menna ella køva. Eitt dømi uppá fyrilestrahaldara kundi í hesum sambandi verið Tórmóður Stórá. Avgjørt varð, at Høgni setur seg í samband við Tórmóð, og um tað ikki letur seg gera, so er Maria Jørðdal “next on the list”. Høgni gevur boð umvegis teldupost, tá hann hevur fingið avklárað viðvíkjandi fyrilestrahaldaranum.

Att 5: Skúlastýrislimirnir taka hvør sína stóra skuffukaku ella tvær smærri kakur við til dagin. Andrea skipar fyri “grillingini” henda dagin. Høgni tosar við Súsannu viðvíkjandi at læna “skótagrilluna” og kol, og Høgni tekur ábyrgdina av at keypa pylsur, breyð o.a. til dagin. Dagurin verður hósdagin 25. juni kl. 14. Talan verður um ein rørslu-spæli-ítróttar-gleði og hugnadegi fyri næmingum og foreldrum. Hetta verður samstundis seinasti skúladagur hjá næmingunum og endabresturin á skemafríu útivikuni.

Att 6: Næsti skúlastýrisfundur verður í Vestmanna tann 9. september kl. 17:15. Næsti regluligi skúlastýrisfundur í Kvívík verður týsdagin 15. september kl. 17:15

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, skrivari